Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Sparingar hjá Sernámi

Spurningar:

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvør nú skal veita sernámsfrøðiliga ráðgeving til starvsfólk og familjur hjá børnum undir skúlaaldur ?
2. Hvussu leingi skulu foreldur, dagstovnar og børn nú bíða eftir sernámsfrøðiligari ráðgeving?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til Sernám, so tað ikki er neyðugt at tillaga virksemið?

Viðmerkingar:
Sernám hevur boðað dagstovnaleiðslunum frá, at virksemið hjá Sernámi verður tillagað fram til juni 2023. Hetta merkir, at dagstovnar og dagrøktir ikki fáa ráðgeving frá sernámsfrøðiligum ráðgeva í hesum tíðarskeiðinum.

Landsstýrismaðurin hevur áður sagt, at stovnurin var farin undir at broyta bygnaðin, og tí varð virksemið broytt, soleiðis at foreldur ikki skuldi venda sær til Sernám, tí stovnurin veitti bert ráðgeving til dagstovnar og skúlar - ikki til foreldur.

Tí er stóri spurningurin, hvør nú skal veita sernámsfrøðiliga ráðgeving til starvsfólk og familjur hjá børnum undir skúlaaldur. Spyrjast kann tí, um foreldur og børn, ið frammanundan hava bíðað alt ov leingi, skulu brynja seg við toli til komandi ár.

Fyri at fáa greiðu á, hvat landsstýrismaðurin vil á økinum, verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 15. september 2022

Eyðgunn Samuelsen